Hergerð Joensen, listakvinna:

# Málninga-framsýning í Smiðjuni



*Hergerð Joensen hevur eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík frá 15. til 19. september*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 15. september kl. 15 letur Hergerð Joensen, listakvinna, upp eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík við akryl- og vatnslitsmyndum.

Hetta er aðru ferð at Hergerð hevur framsýning í Smiðjuni. Hon arbeiðir sum laborantur á Landssjúkrahúsinum hálva tíð, samstundis sum hon eisini málar.

Seinastu árini hevur Hergerð verið á fleiri skeiðum í málningalist í Danmark.

Framsýningin er opin til og við 19. september.

# Lastbilur út av vegnum í Hovi




*Mynd: Erik Christensen*

Í morgun klokkan umleið 10.45 fór ein lastbilur út av vegnum í Suðuroy. Lastbilurin kom koyrandi eftir smala vegnum, sum gongur vestur frá Hovi móti Tvøroyri, og var í millum Hov og Milliónsvingið, sum tey rópa tað í Suðuroy, tá hann møtti einum bili.

Av løgreglustøðini í Tvøroyri verður sagt, at lastbilurin royndi at gera pláss, men fór ov langt út, og so skrædnaði undan honum og hann koppaði út av vegnum.

Politiið sigur, at maðurin gramdi seg eitt sindur um pínu í rygginum, og tí varð hann fluttur á sjúkrahúsið, men annars so hann út til at vera sloppin rættiliga snikkaleysur.

Lastbilurin hevði fingið nakað av skaða, men dugdu teir á løgreglustøðini ikki í verandi løtu at siga, hvussu stórur skaðan er.

-rwd

Smiðjan í Lítluvík

**FRAMSÝNING**

við málningum hjá

**Hergerð Joensen**

**15.19. september 2006**

**Framsýningin er opin:**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 15/9 | kl. 15-20 |
| Leygardag | 16/9 | kl. 10-14 |
| Sunnudag | 17/9 | kl. 15-18 |
| Mánadag | 18/9 | kl. 15-18 |
| Týsdag | 19/9 | kl. 15-18 |

Lesið Sosialin -so eru tit við!